## Alt fleiri fátæk í USA

Tey nýggjastu hagtølini í USA vísa, at hetta seinasta árið eru 1,7 milliónir amerikanarar afturat komnir í tann bólkin, sum verða roknað sum fátæk, og at nú eru 34,6 milliónir fátæk fólk í USA. Eftir amerikonsku skipanini verða fólk mett at vera fártæk, um eini hjún við tveimum børnum tjena minni enn 120.000 krónur um árið.

Í teimum góðu árunum í nítiárunum sluppu nógvir amerikanarar upp um fátækramarkið, men tá vend kom í búskapin í 2001, fór at ganga hinvegin. Serfrøðingar siga, at sjálvt um ein ávís framgongd hevur verið í búskapinum teir seinastu mánaðarnar, hevur tann vanligi amerikanarin ikki fingið nakran ágóða av framgongdini. Nógv fólk hava mist arbeiði, og hagtøl vísa, at í meðal er inntøkan hjá tímaløntum amerikanarum minkað umleið 3.500 krónur um árið tey bæði seinastu árini.

Politiskir eygleiðarar í Washington siga, at tey nýggju hagtølini koma George W. Bush, forseta illa við, tí tað eru ikki meiri enn trettan mánaðir, til amerikonsku veljararnir skulu velja forseta, skrivar Aftenposten..

## Lækni veitti deyðshjálp

Ein franskur lækni viðgekk mikudagin, at hann veitti einum 22 ára gomlum menningartarnaðum manni deyðshjálp.

Frederic Chaussoy hevur greitt frá, at mamma tann 22 ára gamla hevði roynt at taka lívið av tí menningartarnaða soninum, men at tað miseydnaðist. Tá hon síðani vendi sær til læknan at bað hann gera tað fyri seg, gjørdi hann av at gera eftir áheitanini. Sjálvur sigur læknin, at hann hugsaði seg væl um, áðrenn hann tók tað stóra stigið. Myndugleikarnir hava nú biðið læknan møta til avhoyringar, og hann kann vænta at verða ákærdur fyri morð, tí deyðshjálp er ikki loyvd í Fraklandi.

Frederic Chaussoy hevur fyrr verið frammi í franska orðaskiftinum um deyðshjálp. Fyri einum ári síðani skrivaði hann Jacques Chirac, forseta bræv, har hann bað forsetan loyva mammuni at taka lívið av tí 22 ára gamla soninum, sum var vorðin lamin og blindur og hevði støðuga pínu eftir eina vanlukku.

## Kardinalur við rúsevnum

Myndugleikarnir í Meksiko eru farnir at kanna, um kardinalurin Juan Sandoval Imiguez hevur verið uppi í handli við rúsevnum. Meksikanski forsetin, Vicente Fox, er eisini drigin upp í málið, tí hann herfyri sendi eina av tyrlunum hjá stjórnini eftir kardinalinum, sum skuldi í veitslu á forsetaborgini.

Roberto Blancarte, sum er serfrøðingur í viðurskiftum millum meksikanska statin og landsins katólsku kirkju, sigur, at tað er einki nýtt, at kirkjan hevur fingið pengar burtur úr handli við rúsevnum. Herfyri tók blaðið La Reforma evnið upp, og eftir nakrar avdúkandi blaðgreinar gjørdi ríkisákærin av at kanna viðurskiftini hjá Juan Sandoval Imiguez, kardinali.

Tann 70 ára gamli kardinalurin, sum er ovasti í kirkjuni í næststørsta býnum í Meksiko, Guadalajara, noktar seg sekan.

## ES fordømir brúdleyp

ES-nevndin fordømdi fyrradagin eitt giftarmál millum eina 12 ára gamla sigoynaraprinsessu og ein 15 ára gamlan drong í Rumenia.

Brúðurin, Ana Maria, royndi at sleppa til rýmingar, tá hon skuldi giftast seinasta vikuskiftið, men skyldfólk hennara fingu fatur á henni og noyddu hana at gifta seg. ES-nevndin sigur, at gentan er alt ov ung, og nevndin fýlist á, at rumensku myndugleikarnir als einki gjørdu fyri at forða giftarmálinum.

ES-nevndin finst eisini at sigoynarunum, tí teir skuldseta eitt nú teir rumensku myndugleikarnar fyri at geva sigoynarunum eina viðferð, sum er brot á altjóða mannarættindini. ES-nevndin sigur, at sigoynararnir eiga fyrst at hugsa um, hvat teir sjálvir gera, tí teirra egna framferð er eisini í stríð við mannarættindini.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Ivi um nýggjan oljusáttmála

**Ivi hevur tikið seg upp um nýggja sáttmálan millum donsku stjórnina og A.P. Møller um oljuna í Norðsjónum. Ivi er bæði um tað búskaparliga og tað løgfrøðiliga**

DANMARK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Danskir serfrøðingar seta nú spurnartekin við tann nýggja sáttmálan, sum stjórnin hevur gjørt við A.P. Møller.

Sambært stjórnini fer sáttmálin at geva ríkiskassanum tvær milliardir krónur afturat um árið hetta til 2012, men hesum ivast ein av teimum trimum vísmonnunum, Jørgen Birk Mortensen, í. Við Politiken sigur hann, at eykainntøkan hjá tí almenna er tengd at oljuprísinum og dollarakursinum, sum hækka og lækka, og tí heldur hann ikki, at tað ber til at siga, hvat ríkiskassin fær burtur úr sáttmálanum.

Eitt annað er tað løgfrøðiliga í sáttmálanum. Henrik Zahle, professari í statsrætti á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, segði við Jyllandspostin í gjár, tann nýggi sáttmálin er kanska í stríð við donsku grundlógina. Sambært sáttmálanum skal oljuskatturin ikki hækka tey næstu 39 árini, og hetta stríðir møguliga ímóti grundlógini, sigur Henrik Zahle, tí hendan reglan í sáttmálanum forðar komandi fólkatingum at hækka oljuskattin.

# Gerhard Schrøder hóttir við at fara frá



Gerhard Schrøder hóttir við at fara frá, samtykkir Ríkisdagurin ikki uppskotini um at broyta vælferðarsamfelagið

Mynd: Reuters

**Stríðið um týska vælferðarsamfelagið er vorðið so hart, at tað kann kosta sosialdemokratunum stjórnarvaldið. Samstundis hóttir kanslarin við at fara frá fyri jól**

TÝSKLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Týska stjórnin hevur sett sær fyri at nýskipa vælferðarsamfelagið, tí tað almenna hevur ikki ráð at fíggja verandi vælferðarskipanir, sum kosta ríkiskassanum meiri og meiri, sum árini ganga. Eitt nú ætlar stjórnin at skerja almennu veitingarnar, at fólk skulu rinda ein part fyri viðgerð í heilsuverkinum og at hækka pensjónsaldurin.

Tann 17. oktober skal tingið atkvøða um eitt uppskot, sum skerjir arbeiðsloysisstuðulin, men tað er minni enn so vist, at uppskotið verður samtykt. Seks av tinglimunum hjá sosialdemokratunum sýta fyri at taka undir við uppskotinum, og teir hava gjørt greitt, at teir ætla sær ikki at gera eftir harraboðum frá flokksleiðsluni.

Gerhard Schrøder, kanslari, ávarar um, at atkvøðugreiðslan um at broyta vælferðarsamfelagið kann enda sum í 1982, tá eitt stríð um búskaparlig tiltøk sprongdi samgonguna millum SPD og Fríu Demokratarnar við tí úrslitið, at Helmuth Schmidt, kanslari, mátti frá eftir eina misálitisatkvøðugreiðslu í samveldisdegnum. Ta lagnuna ætlar Schrøder sær ikki, skrivar Frankfurter Allgemeine Zeitung,og tí hóttir hann við at fara frá fyri jól, verða nýskipanaruppskotini ikki samtykt.



# Fyrrverandi útisetar hittust í Fuglafirði



Nógvir fyrrverandi útisetar møttust seinasta leygardag

**Í sambandi við at 30 ár vóru liðin síðan virksemi í Kristnastovu í Keypmannahavn byrjaði, hittust umleið 250 fyrrverandi útisetar í Siloa í Fuglafirði seinasta leygardag til eina samkomu**

SAMKOMA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Leygardagin 27. september var samkoma fyri fyrrverandi útsetar, ið høvdu sína gongd í Kristnastovu í Keypmannahavn og komu har til møti og onnur tiltøk, meðan tey vóru í Danmark í lestrarørindum ella fingu sær aðra útbúgving.

Samkoman byrjaði kl. 11.00 við at Terji á Lakjuni í Fuglafirði, vegna samkomuna í Siloa, beyð øllum at vera vælkomin.

Síðan greiddi Henry Olsen, sum leiddi dagin, frá skránni fyri dagin. Susan og Øssur Berghamar, leiðarar í Kristnastovu, byrjaðu við at siga nakað um upprunan til verkið í Kristnastovu.

Har var annars nógv ymiskt á skránni, so sum felagssangur og fyrrverandi útisetar sungu í smærri bólkum. Eisini varð greitt frá, hvussu tað var at vera útiseti í teimum ymisku tíðarskeiðunum frá 70-unum til aldarskiftið. Tey sum greiddu frá vóru: Marjun Poulsen, úr Havn, Dagny Tróndheim, úr Klaksvík, Høgni Hansen úr Fuglafirði, og Kristian Hansen, úr Klaksvík.

Andrew Berghamar, sonur Susan og Øssur, segði frá, hvussu tað var at vera barn og vaksa upp í Kristnastovu.

Símun Pætur á Torkilsheyggi og Poul Jóhan Djurhuus, sum í fleiri førum hava hjálpt til í Kristnastovu, greiddu frá ymiskum hendingum har niðri. Samrøða var við Jóannes Hansen um sjónvarpsendingina "Sjónarringurin", sum Kristnastova stóð fyri í áttatiárunum og varð sædd av nógvum útisetum. Prát var eisini við Jóhan Restorff, sum hevur verið í Kristnastovu-nevndini síðani byrjan. Nógv annað áhugavert kom fram henda dagin, har eisini góða veðrið setti sín dám á.



Sara og Andrew Berghamar og Susan og Øssur Berghamar frá Kristnastovu í Keypmannahavn

### Ymisku tíðarskeiðini

Myndir, ið vórðu tiknar gjøgnum hetta 30 ára tíðarskeiði, vórðu vístar á stórskýggja.

Tá tað leið móti endanum greiddi Øssur Berghamar frá tí sum hevði eyðkent hesi farnu 30 árini fram til dagin ídag.

Sjeytiárini fingu yvirskriftina "Ein avbjóðing í einari uppreistrartíð": Tey árini vóru merkt av tí mótmælisanda sum sokallaða 68-generatiónin hevði skapt og ávirkaði nógvar lesandi føroyingar.

Áttatiárini fingu yvirskriftina "Virksemið veksur og flokkurin við". Hesi árini vaks virksemið nógv, og flutt varð í nýggju Kristnastovu í 1979.

Nítiárini fingu yvirskriftina "Ein lívd í kreppuárunum". Hesi árini var Kristnastova kanska serliga ein andalig lívd hjá mongum føroyingum, sum vóru komnir til Danmarkar í kreppuárunum.

Nýggja øldin fekk yvirskriftina, "Nýggj øld við nýggjum avbjóðingum"

### Ein tíð við góðum minnum

At enda talaði Klæmint Eliasen, búsitandi í Fuglafirði, um týdningin av at spyrja seg sjálvan, hvar ein er staddur nú. At vit mugu støðugt rætta okkara andaligu kumpass, soleiðis at vit vissa okkum um, at vit eru á rættari leið.

Eini 180 fólk vóru við til hesa samkomuna - og við sær høvdu tey eini 50-60 børn. Meðan tey vaksnu vóru í Siloa, vóru børnini í Mentunnarhúsinum, sum er hinumegin gøtuna, og har varð skipað fyri ymiskum til undirhalds.

Tiltakið endaði kl 19.00. Fyrrverandi útisetarnir var væl umboðaður av fólki, sum høvdu verið niðri í Danmark í teimum ymisku tíðarskeiðunum - og fegin um at fáa høvi at vera saman aftur og minnast aftur á eina farna tíð við nógvum góðum minnum.



Klaksvíkingurin, Henry Olsen, sum býr í Havn og Erling í Liða, sum býr á Argjum



Marjun Poulsen í Havn, sum búði í Keypmannahavn tá Kristnastova byrjaði, greiddi frá hvussu hon upplivdi hesa tíðina